

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 07 - 2012

# Føroyar ágóða av broytingum í Arktis

Í røðu síni á ólavsøku nam løgmaður eisini við veðurlagsbroytingarnar í Arktis, sum hann metti fara at skapa nýggjar møguleikar og avbjóðingar. Skipaferðslan í Norðurhøvum veksur og fer at vaksa meir í framtíðini. Føroyar liggja mitt á hesi nýggju sjóleið. Landsstýrið arbeiðir á fleiri økjum til tess at fáa búskaparligan ágóða av broytingunum. Føroyar eru við í felags arktiskari strategi fyri Kongsríkið. Landsstýrið hevur harafturat sett ein bólk at greina, hvussu Føroyar kunnu gagnnýta økta virksemið í Arktis. Dentur verður lagdur á vinnu og gransking, umframt hvørji átøk vit mugu fremja viðvíkjandi tilbúgving og náttúruvernd. Greiningin verður liðug komandi vár, segði løgmaður.